UTTAN ÚR HEIMI

## Prestar misnýtt 800 børn

Næstan 800 fólk í amerikanska býnum Boston hava greitt ákæruvaldinum frá, at prestar og onnur starvsfólk í katólsku kirkjuni í býnum misnýttu tey kynsliga, og at hetta skal hava staðið við líka síðani 1940.

Tað sigur statsadvokaturin í statinum Massachusetts, sum hevur kannað viðurskiftini. Sambært skjølum hjá katólsku kirkjuni í Boston hava umleið 250 prestar og onnur starvsfólk hjá kirkjuni misnýtt 789 fólk hesi seksti árini.

Gølan um kynsliga misnýtslu í katólsku kirkjuni í USA byrjaði í januar í fjør, tá tað varð avdúkað, at kirkjan í Boston hevði sett prestar í starv, sjálvt um kirkjuleiðslan visti, at teir vóru undir illgruna fyri at hava misnýtt børn og ung kynsliga. Málið endaði eisini í Vatikaninum í Rom, og Jóhannes Páll pávi gjørdi av at lata amerikanska kardinalin, Bernhard Law, fara úr embætinum. Kardinalurin kemur tó neyvan fyri rættin, tí tann lógin, sum nú er galdandi á økinum, kom ikki í gildi fyrr enn í fjør.

## Nei til evruna

Sviar fara eftir øllum at døma at vraka felags evropeiska gjaldoyrað, evruna, tá fólkaatkvøða verður um spurningin í september.

Sambært einari kanning, sum danski bankin Danske Bank hevur skipað fyri, taka 43 prosent undir við, at evran skal koma ístaðin fyri svensku krónuna, men 52 prosent siga, at tey vilja heldur varðveita krónuna. Verður hetta úrslitið borið saman við eina kanning í juni sæst, at meirilutin ímóti evruni er vaksin fýra prosentstig hendan seinasta mánaðin.

Svenska stjórnin roynir at sannføra sviar um, at teir eiga at landið eigur at fara upp í felags gjaldoyrasamstarvið. Í Danmark og Bretlandi bíða politikarar og onnur spent eftir svensku avgerðini. Svøríki, Danmark og Bretland eru tey einastu ES-londini, sum ikki hava sett evruna í gildi.

## Nógvar stjørnur

At nógvar stjørnur eru á himmalhválvinum, hava fólk altíð vitað, men nú hava avstralskir stjørnufrøðingar roynt at kanna, hvussu mangar stjørnurnar í rúmdini veruliga eru.

Teir eru komnir eftir, at talið er 70.000.000.000.000.000.000.000 ella 70 trilliardir, og sambært amerikonsku sjónvarpsstøðini CNN merkir tað, at tað eru meiri enn tíggju ferðir fleiri stjørnur í rúmdini enn sandkorn á Jørðini.

Tað er ivaleyst óneyðugt at siga, at teir avstralsku granskararnir hava ikki talt stjørnurnar. Simon Diver, sum er ein av granskarunum, sigur, at teir hava tikið eina ávísa ál út ígjøgnum alla rúmdina, talt ella rættari sagt mett um stjørnurnar í henni og síðani faldað talið. Diver sigur, at tað er væl hugsandi, at uppaftur fleiri stjørnur eru í rúmdini, men við teirri útgerð, sum er til í dag, kann staðfestast, at talið er um 70 trilliardir.

## Mótmæla OL- skøkjuhúsum

Sjey norðurlendskir og baltiskir ráðharrar í javnstøðumálum hava skrivað griksku myndugleikunum bræv, har teir mótmæla einari ætlan um at loyva fleiri skøkjuhúsum í sambandi við olympisku summarleikirnar í Athen næsta ár.

Brævið er sent borgarstjóranum í Athen, og javnstøðuráðharrarnir í Íslandi, Noregi, Svøríki, Finnlandi, Estlandi, Letlandi og Litava hava skrivað undir tað. Danski ráðharrin varð eisini biðin um at skriva undir brævið, men gjørdi tað ikki.

Skøkjulevnaður er lógligur í Grikkalandi, og grikkar vænta, at eftirspurningurin eftir kynsligum tænastum fer at veksa nógv undir olympisku leikunum, og tí ætla teir at loyva fleiri skøkjuhúsum í Athen. Tað halda norðurlendsku og baltisku javnstøðuráðharrarnir vera púra burturvið.

# Loynilig deild leitar eftir Saddam Hussein



*Hermenn úr Taske Force 20 á einum húsarhorni í Mosul, har synir Saddams vórðu funnir.*

**Nú teir báðir synir Saddams Hussein eru deyðir, eru amerikanarar av álvara farnir at leita eftir Saddam sjálvum. Ein loynilig deild hevur fingið uppgávuna at finna hann.**

IRAK

*Árni Joensen:*

Amerikanska fregnartænastan heldur, at gamli irakski einaræðisharrin fjalir seg einastaðni í Irak.

Higartil hevur hann ikki verið at finna nakrastaðni, men nú hava amerikanarar sett eina serliga deild at leita eftir honum. Taske Force 20, sum deildin eitur, var eisini við, tá Uday og Qusay vórðu funnir í einum húsum í Mosul mánadagin. Nú skal deildin bara finna Saddam Hussein sjálvan.

– Okkara stóra mál er at finna Saddam, og vit fara eisini at finna hann, sigur amerikanski ovastin í Irak, generalurin Ricardo Sanchez.

Seinastu vikurnar hava amerikanararnir fingið fleiri ábendingar um, hvar Saddam Hussein og synir hansara hava fjalt seg. Nú synirnir eru deyðir, vóna amerikanararnir, at fleiri irakar fara at tora at avdúka gamla leiðaran. Tí hevur herleiðslan góðar vónir um, at hann verður funnin.

Sama dag sum amerikanararnir søktu at húsunum í Mosul, har Uday og Qusay fjaldu seg, leyp Taske Force 20 á eini stór hús nærhendis ánni Tigris einar 50 kilometrar norðan fyri Bagdad. Ein iraki hevði greitt amerikanarunum frá, at Saddam Hussein var staddur í húsunum. Fleiri hernaðarakfør vórðu send á staðið, og menn úr Taske Force 20 tóku seg inn í húsini. Men har var eingin Saddam Hussein at finna.

Sum skilst gongst tað illa hjá amerikanarunum at fáa nakra álítandi ábending um, hvar gamli einaræðisharrin er, sjálvt um USA hevur lovað finnaranum einar 170 milliónir krónur í finningarløn.

# Umhvørvisbumbur ígjøgnum donsku sundini

**Um ein mánað sleppa tangaskip við einkultum skrokki ikki at sigla ímillum ES-havnir, men tað fer ikki at tálma siglingini ígjøgnum tey donsku sundini.**

OLJUFLUTNINGUR

*Árni Joensen:*

ES hevur gjørt av, at í framtíðini sleppa tangaskip, sum bert hava einkultan skrokk, ikki at sigla millum havnir í ES-londunum. Hesi tangaskipini verða mett sum umhvørvisbumbur, og tey hava verið orsøk til fleiri umfatandi oljudálkingar tey seinastu árini.

Men nýggja ES-reglan loysir minni enn so allar trupulleikarnar hjá dønum, tí reglan umfatar ikki tey nógvu russisku tangaskipini, sum flyta olju til og úr havnunum við Eystrasalt ígjøgnum tey donsku sundini. Tað heldur danska sjóferðslustýrið vera ein stóran trupulleika.

Í 2000 fóru 3.861 tangaskip ígjøgnum Stórabelti, í 2001 vóru tey 3.961 í tali og í fjør 4.202. Sambært sjóferðslustýrinum er fjórðingurin av skipunum, sum fara ígjøgnum Stórabelti, líka stór ella størri enn "Prestige", sum sakk úti fyri sponsku strondini.



UTTAN ÚR HEIMI

# Heimsins yvirlækni farin frá



**Gro Harlem Brundtland hevur sett síni spor - ikki bert í Noregi, men eisini í heimsins heilsustovni WHO, fjølmiðlunum og millum sjúk og fátæk, rík og ráðandi. Mánadagin legði hon frá sær sum aðalskrivari í WHO.**

BRUNDTLAND

*Árni Joensen:*

Tað varð lagt til merkis, tá tann mynduga norska kvinnan, sum hvørki tolir tubbaksroyk ella fartelefonir, fór frá sum aðalskrivari í heimsins heilsustovni mánadagin. Nógvir fjølmiðlar kring heimin umrøddu tilburðin og ikki minst kvinnuna og hennara avrik. Bretska Financial Times gjørdi nógv burtur úr fráfarna aðalskrivaranum og vísti á, hvat WHO var, áðrenn hon tók við, og hvat stovnurin er, nú hon hevur lagt frá sær.

Gro Harlem Brundtland, sum er útbúgvin lækni, gjørdist aðalskrivari í einum ST-stovni, sum ikki var serliga høgt í metum. Stovnurin hevði vunnið sær eitt ávíst umdømi eftir bardaga ímóti fleiri vandamiklum umfarssjúkum, men avbjóðingarnar vóru eisini nógvar. Lívshóttandi sjúkur so sum krabbamein, hjartasjúkur og sukursjúka høvdu eisini breitt seg til tey fátæku londini, og her gekst illa hjá WHO at megna sína uppgávu. Harafturat kom bardagin ímóti AIDS. Hetta gjørdist ov mikið fyri WHO, og úrslitið varð eisini, at ST skipaði ein serligan stovn, sum skuldi átaka sær at virka ímóti AIDS.

### Tubbak og fartelefon

Men so kom kvinnan, sum í trý skifti hevði verið forsætisráðharri í Noregi, til Genéve. Hon hevði áræði, dirvi, ídni og ógvuliga treisk, siga tey, sum lærdu hana at kenna. Sjálvt tey, sum tá høvdu hug at finnast at henni, siga nú, at hon hevur gjørt eitt gott arbeiði.

Longu í byrjanini hevði hon sett sær eitt greitt mál: Nú skuldu heilsumál upp á hægsta politiska stig, so forsetar, forsætisráðharrar og ikki minst fíggjarmálaráðharrar skuldu tosa um heilsumál. Úrslitið er, at tað nú verður sagt um hana, at hon hevur fingið heilsu- og umhvørvismál inn á altjóða politiska pallin, og at tað hevur eydnast henni at fáa heimsins leiðarar at játta meiri pengar til heilsuna hjá heimsins borgarum.

Mong hava illneitast inn á hana, tí tey halda, at hon hevur havt ov gott samband við ídnaðarfyritøkur fyri at fáa pengar burtur úr teimum, men tað merkir ikki, at hon hevur verið hjartabarnið hjá øllum altjóða ídnaði. Tvørturímóti hevur tubbaksídnaðurin havt ilt eyga á henni.

Tí Gro Harlem Brundtland hevur lagt stóran dent á at kunna fólk kring heimin um, hvussu vandamikið tað er at roykja. Úrslitið av hesum var eisini tann fyrsti altjóða heilsusáttmálin, har øll tey 192 londini í WHO bundu seg til at banna allari tubbaksreklamu og at tálma tubbaksnýtsluni, sum á hvørjum ári kostar umleið fimm milliónir mannalív. Í Vesturheiminum valdu mong at leggja av at roykja, og tá tubbaksídnaðurin ístaðin fyri vendi sær ímóti teimum fátæku londunum, valdi Brundtland alt fyri eitt at hevja sína ávarandi rødd har eisini.

Tað var eisini hon, sum segði, at tað er vandamikið at tosa í fartelefon, og hon bannaði fólki at nýta fartelefon, har hon var stødd. Hetta fekk sum vera mann øði í fartelefonídnaðin, men forboð kom tó einki.

### Malaria og SARS

Sum leiðari í WHO hevur Gro Harlem Brundtland lagt stóran dent á at fáa tamarhald á malaria-sjúkuni. Hon hevur roynt at vísa á, at sjúkan rakar ikki bert einstaklingar ella heil húski, men at hon eisini hevur stóra ávirkan á búskapin í fleiri londum, og at tað tí er umráðandi at fáa tamarhald á henni. Men hóast WHO hevur gjørt nógv fyri at basa malariasjúkuni, breiðir hon seg framvegis.

Sjálv heldur Gro Harlem Brundtland, at tað væleydnaða heimsátakið ímóti lungnasjúkuni SARS hevur prógvað, at WHO hevur endurvunnið sína støðu sum ein álitisfullur og virdur stovnur. Hon gjørdi ikki so nógv burtur úr sær sjálvari, tá sjúkan herjaði, men kortini eydnaðist tað WHO at fáa myndugleikarnar í teimum einstøku londunum at gera eftir teimum tilráðingum, sum stovnurin kom við. Úrslitið er, at SARS er bart niður. Summir granskarar vænta, at sjúkan fer at taka seg uppaftur seinni í ár, men takkað verði tilráðingunum frá WHO eru heimsins heilsuverk munandi betur fyrireikað, kemur sjúkan aftur.

Nú hon hevur lagt frá sær eftir fimm ár í leiðarastarvinum í WHO, flytir tann 64 ára gamli læknin til Fraklands at búgva.

*(Kelda: Aftenposten)*